Starvslýsing

Børn & Ung: Stuðulsfólkaskipanin fyri børn

## Pedagogar ella starvsfólk við heilsufrøðiligari útbúgving til Reiðrið

Søkt verður eftir starvsfólki við námsfrøðiligari ella heilsufrøðiligari útbúgving til at samskipa umlætting fyri børn og ung við fjølbreki og menningartarni.

Uppgávan er í løtuni at arbeiða í hølunum hjá Dagstovninum Reiðrið, sum er á Saltnesi. 3 – 4 børn og ung eru til umlætting í senn. Arbeitt verður í bólkum, ein fastur starvsfólkabólkur til ein fastan barna- og ungdómsbólk. Hvør bólkur hevur umlætting 10 vikuskiftir um árið.

**Størvini:**
Talan er um 11 størv at arbeiða ímillum 26 og 38 tímar pr. vikuskifti. 7 størv eru dag og kvøldvaktir og 4 størv eru náttarvaktir.

Um eingin við viðkomandi útbúgving søkir størvini, verða hjálparfólk sett.
Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Súsanna Holm, tlf 236515 ella Ragnhild Dahl, tlf 236502

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skulu sendast til:

Nærverkið, Børn & Ung
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn
Argjaboðagøta 7,
160 Argir

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Børn & Ung: Stuðulsfólkaskipanin fyri børn

## Heilsustarvsfólk til eldraøkið í Norðoyggjum

**Heimatænastan og Norðoya Røktarheim** søkja eftir heilsustarvsfólki. Talan er um fast starv fyribils í Sambýlinum á Heygnum í 20 tímar um vikuna í skiftandi vaktum frá 1 septembur og møguliga eitt fast starv á 20 tímar um vikuna í Sambýlinum í Bøgøtu frá 1. desembur.

Í Uppistova á Norðoya Røktarheimi er talan um eitt starv í 40 tímar um vikuna í skiftandi vaktum sum skjótast ella frá 1. septembur.

Vit sóknast eftir røktarstarvsfólkum, ið brenna fyri arbeiðinum á eldraøkinum, og bjóða størv við nógvum avbjóðingum.

**Setanartreytir**
Størvini verða lønt eftir sáttmála millum fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Marnu Ellingsgaard, deildarleiðara í heimatænastuni á tlf. 762404 ella til Marjun V. Jacobsen, deildarleiðara á Uppistovu á tlf. 457601.

**Umsókn**
Umsókn við avrit av prógvum og møguligum viðmælum skal sendast til:

Sambýlið á Heygnum
Undir Kráarbrekku
700 Klaksvík
Stílað til: Marnu Ellingsgaard

Og/ella

Norðoya Røktarheim
Víkavegur
700 Klaksvík
Stílað til: Marjun V. Jacobsen

**Umsóknarfreist: 9. august 2010**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

Starvslýsing

Børn & Ung: Stuðulsfólkaskipanin fyri børn

## Pedagogar

**Í Streymoy:**
Talan er um eitt starv og arbeiðsuppgávan er í løtuni at starvast í toymi, sum heldur til í leigaðum hølum á Landavegnum. Toymið er dagtilboð fyri børn og ung við m.a. menningartarni. Arbeiðsuppgávan er í løtuni at skipa dagin og fara við til frítíðartiltøk seinnapartar. Arbeiðstíðin er 22 tímar um vikuna. Setanartíðin er frá 01.08.2010.
Talan er um eitt starv har arbeiðsuppgávan í løtuni er at fara við nøkrum ungum dreingjum at svimja og til onnur ítriv seinnapartar. Arbeiðstíðin er 20 tímar um vikuna. Setanartíðin er frá 16. 08. 2010.

**Í Eysturoy:**
Talan er um eitt starv, har arbeiðsuppgávan í løtuni er, at starvast í toymið, sum heldur til í leigaðum hølum í Runavík.Toymið er dagtilboð fyri børn og ung við m.a. menningartarni og autismu. Arbeiðsuppgávan er í løtuni at skipa dagin og fara við til frítíðartiltøk seinnapartar. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna. Setanartíðin er frá 16.08.2010.

**Í Norðoyggjum:**
Talan er um starv, har arbeiðsuppgávan í løtuni er, at verða stuðulsfólk hjá einum barni við autismu. Arbeiðið fevnir m.a. um at skipa dagin og fara við til frítíðartiltøk seinnapartar. Arbeiðstíðin er 25 tímar um vikuna. Setanartíðin er frá 01.08.2010.

**Setanartreytir**
Størvini verða sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Pedagogfelag. Um eingin námsfrøðingur søkir, verða fólk við øðrari viðkomandi útbúgving ella hjálparfólk sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið ella avvarðandi sáttmála.

Møguligir umsøkjarir muga hava koyrikort.

Fleiri upplýsingar um størvini fáast við at venda sær til Stuðulsfólkaskipanina fyri børn, Súsanna Holm, tlf. 236515 og Ragnhild Dahl, tlf 236502

**Umsókn**
Skrivlig umsókn við prógvum og viðmælum skal sendast til:

Nærverkið, Børn og Ung,
Stuðulsfólkaskipanin fyri børn
Argjaboðagøta 7,
160 Argir

**Umsóknarfreist: 9. august 2010**

Nærverkið veitir tænastur til borgarar við serligum tørvi, sum búgva heima, á bústovnum ella á sambýlum. Vit skapa møguleikar fyri lívsgóðsku við støði í tørvi og førleika hjá tí einstaka. Okkara eyðkenni er, at starvsfólkið leggur dent á professionalismu, dygd og nærleika. Nærverkið er sjálvstøðugur stovnur undir Almannamálaráðnum. Umframt Meginskrivstovuna, ið hevur yvirskipaðu leiðsluna, eru fýra deildir: Heimatænastan, Trivnaðartænastan, Stuðulstænastan og Børn & Ung. Umleið 1600 fólk starvast í Nærverkinum.

NÆRVERKIÐ

Meginskrivstovan · Argjavegur 26 · Postsmoga 3037 · 110 Tórshavn
Tel 360000 · Faks 360001 · naerverk@naerverk.fo · www.naerverk.fo

www.naerverk.fo

www.sosialurin.fo

40 fóts bingja

Er til sølu til hægstbjóðandi yvir kr. 10.000,-

Boð skulu verða kommunuskrivstovuni í hendi innan 23. august 2010

SANDS KOMMUNA
trygd og trivnaður fyri øll

Mørkin Mikla 3 | Tlf. 361034 | fax 361734 | www.sandur.fo

Sosialurin

Lesið Sosialin - so eru tit við